Skráin

1. Síðan seinast.
2. Skriv frá Skúlastýrunum í Suðuroynni...
3. Nordplus vitjanir okkara
4. Verkætlan "Ver Virkin"
5. Játtan ---- felagshøli / gl. Svimjihylur
6. Ymiskt
   - Gigni...... Í Vágs Skúla

**Ad. 1**

Práta var um hugburð okkara til próvtøl í 5. – 6. flokki og hvar arbeiði at broyta hetta lá? Skúlastýrið bakkar upp um ætlanina at gevast við at geva próvtøl í 5. & 6. flokki. John Henrik tekur málið víðari og kemur aftur við einum uppskoti til hvussu skúlin kann fara frá próvtølum í 5. – 6. flokki og hvat skal koma í staðin fyri próvtølini.

Práta var eisini um skúlalaðið, sum treingir til eina nýtímansgerð. Avgjørt var í samráð við Levi at senda skriv til umsitingina og umbiðja eina tekning av einum "nýggjum" skúlalaðið.

**Ad. 2**

Felagsfundur hevur verið fyri skúlastýrini í Suðuroynni. Av missgávum var fundarinnkallingin ikki komin til skúlastýrið í Vágs Skúli.

Skúlastýrini í Suðuroynni hava eitt ynski um at fáa ein sálarfrøðing knýttan at skúlaøkinum. Niðanfyri er skrivið sum er sent til kommunustýrini í oynni.

-----------------------------------------------------------------

*Til kommunustýrini í Suðuroynni.*

*Skúlastýrini í Suðuroynni vilja hervið heita á øll bygdaráðini í oynni um at taka avgerð um at seta ein skúlasálarfrøðing fyri alla oynna.*

*Talan er um eitt fólk, sum skal búgva í oynni, og sum skal skifta millum skúlarnar eftir ávísum leisti.*

*Sum øllum kunnugt er talið av børnum, sum hava tørv á sálarfrøðisligari hjálp, í støðugum vøkstri, og hjálpin frá Sernám minkar alsamt, tí tey m.a. ikki kunnu taka sær av beinleiðis kanningum, kunnu bara koma til Suðuroyar heilt fáar ferðir um árið.*

*Tað eru alt fleiri børn, sum hava skúlaaftran og aðrar sálarligar avbjóðingar, og vit halda tað vera sera umráðandi, at børnini fáa ta hjálp, tey hava tørv á so tíðliga sum møguligt, og at hjálpin kann veitast á staðnum.*

*Vit vilja vísa eisini vísa til ta loysn, sum skúlin í Klaksvík hevur roynt í eitt ár við sera góðum úrsliti.*

*Við vón um vælvild*

*Skúlastýrini í Suðuroynni*

-------------------------------------------------------------------

Skúlastýrið í Vágs Skúla tjakaðist um málið og gjørdi av at senda skrivið til Vágs Kommunu, so vit kunnu verða ein partur av hesum felags átakið.

Ad. 3

Skúlin hevur havt vitjan av lærarum úr Reykjavík, Oulu, Nuuk og Tallinn í sept./okt. Hetta tí vit eru partur av tveimum Nordplus verkætlanum, sum hava til endamáls at menna undirvísingina í skúla okkara. Okkara núverandi 8. flokkur er boðin til Reykjavíkar og Oulu í Finlandi at vitja næmingar higani. Hesar ferðir verða komandi skúlaár.

Ad. 4

**Heiti: Ver Virkin – trívnaður í Vágs Skúla**

**Endamál: Endamálið í verkætlanini er at allir næmingar í Vágs Skúla skulu verða virknir. Vit taka støði í ABC fyri Sálarheilsu hjá Fólkaheilsuráðnum og nýta granskingargrundaðu rørslukonseptini FIT FIRST (10, 20 of TEEN).**

ABC fyri sálarliga heilsu er ein verkætlan hjá Fólkaheilsuráðnum, sum er í áhaldandi menning. Endamálið við ABC fyri sálarliga heilsu er at fremja sálarliga heilsu og trivnað millum íbúgvarnar í Føroyum. **Sálarlig heilsa snýr seg um alt tað, ið ger lívið vert at liva**. Tað hevur eins stóran týdning at ansa eftir og varðveita góða sálarliga heilsu, eins og tað hevur týdning at ansa eftir kropsligu heilsuni

Í stuttum vilja vit verða VIRKIN. Hvar merkir tað ??

- Tú kanst vera kropsliga virkin á nógvar ymiskar hættir og á nógvum ymiskum støði. Tú kanst fara ein gongutúr, rennitúr, svimjitúr, spæla hondbólt ella badminton, dansa til títt yndislag ella gera reint.
- Tú kanst vera sosialt virkin tá tú ert saman við familju, vinum, starvs- ella floksfeløgum, tosar við grannan ella fólk tú kennir til handils, tú kanst vera partur av onkrum frítíðarfelagsskapi sum t.d. kóri, veving, leir ella taka lut í øðrum sosialum virksemi.
- Tú kanst vera sálarliga virkin tá tú lesur eina bók, loysir krossorðagátu, spælir borðspæl, fert í biograf ella vitjar eitt listasavn. Tað snýr seg um at tú gert okkurt, sum krevur at tú hugsavnar teg.
- Tú kanst vera andaliga virkin tá tú fert til gudstænastu ella á møti, venur joga, fert ein friðarligan túr í náttúruni - eini viðarlund, við havið ella í hagan. Tú kanst eisini vera andaliga virkin tá tú tosar við ein vin um lívsins stóru spurningar. Yvirskipað snýr tað seg um at finna frið og hugdýping.

**Danska Sundhedsstyrelsen viðmælir**

- at børn og ung í aldrinum 5-17 ár skulu vera kroppsliga virkin í minst 60 min. um dagin. Hetta virksemi eigur at vera við høgari megi ella kraft og eru ikki at sammeta við vanligt dagligt virksemi.
- At børn og ung í aldrinum 5-17 ár minst 3 ferðir um vikuna skulu luttaka í kroppsligum virksemi við høgum virksemi í minst 30 min. hvørja ferð. Hetta fyri at halda viðlíka konditión og vøddastyrki. Hetta virksemi er ætla at økja um styrkina í beinagrindini og fremja fimi.
- Vit fara at skipa TAÐ AT VERÐA VIRKIN sum eina afturvendandi vikuætlan har vit dansa
- føroyskan dans ein dag um vikuna. Vit hava hugsavnan/listarløtu ein dag og vit taka støði í
- FIT FIRST 3 dagar um vikuna – Her er ætlanin at vit skipa fyri kroppsligum virksemi við
- høgum virksemi"intensiteti" .

Ætlan fyri flokkarnar og virksemi við høgum intensiteti í 10 vikur.......

| 27 tímar | Mán | Týs | Mik | Hós | Frí |
|---|---|---|---|---|---|
| Kl. 8-9 | 1 | 1 | | 1 | 7 |
| Kl. 9-10 | 2 | 2 | | 2 | 8 |
| Kl. 10-11 | 2 | 3 | | 3 | 9 |
| Kl. 11-12 | 4 | 7 | 4 | 7 | 4 |
| Kl. 12-13 | 5 | 8 | 5 | 8 | 5 |
| Kl. 13-14 | 6 | 9 | 6 | 9 | 6 |
| Kl. 14-15 | | | | | |

| 21 tímar | Mán | Týs | Mik | Hós | Frí |
|---|---|---|---|---|---|
| Kl. 8-9 | 1-2 | 1-2 | | 1-2 | 7-8 |
| Kl. 9-10 | 3 | 3 | | 3 | 9 |
| Kl. 10-11 | 4 | 7-8 | 4 | 7-8 | 4 |
| Kl. 11-12 | 5 | 9 | 5 | 9 | 5 |
| Kl. 12-13 | 6 | | 6 | | 6 |
| Kl. 13-14 | | | | | |
| Kl. 14-15 | | | | | |

Hetta virksemi kemur at krevja nakað eyka av skúlanum. Tískil ynskir skúlin stuðul til at fáa hjálp útifrá til at gera hetta virksemi við høgum intensiteti við næmingunum

Skúlin metir at hetta kostar umleið kr. 60.000,- fyri 10 vikur ella umleið 6.000,- um vikuna. Ynski skúlans er ikki at hækka játtan skúlans, men at fáa eina góðkenning frá mentunarnevndini at brúka peningin av verandi játtan skúlans.

Eitt samt skúlastýrið helt at ætlanin ljóðaði sera spennandi og Levi, formaður í mentunarnevndini mælti til at arbeiða víðari við ætlanini, so leingi hon kundi gerast innanfyri verandi fíggjarkarmar.

Ad. 5

Ætlaða umbyggingin av gl. Svimjihylið var á skrá, nú kommunan hevur boða frá at íløgu játtan skúlans aftur í ár verður skerd við kr. 400.000,-. Levi boðaði frá, at hetta var avgerðin hjá samgonguni, og at skúlin heldur ikki komandi ár skuldi rokna við, at nakað bleiv gjørt við tørvin hjá skúlanum um felagshølið.

Ad. 6

Vágs Skúli hevur, líkasum Tvøroyar Skúli, verið uttan heilsufrøðing í longri tíð. Gigni hevur boðað frá at eingin umsókn var til starvið sum heilsufrøðingur

Niðanfyri nevnda skriv er sent Vágs- og Tvøroyar skúla.

---------------------------------------------------------

*Góðu tit,*

*Vit hava aftur havt starvslýsing úti eftir heilsufrøðingini at arbeiða í Vágs Skúla og Tvøroyrar Skúla. Tað harmar okkum at siga, at eingin umsøkjari var til starvið.*

*Vit hava tó fingið ein heilsufrøðing úr Danmark, sum kemur at arbeiða sum skúlaheilsufrøðingur í Suðri frá viku 5 til viku 10 í 2023. Hon eitur Connie Faurholt.*

*Hon kemur í nevnda tíðarskeiði at gera allar útskúlakanningarnar í 9. flokki og eisini at undirvísa 9. flokkunum um seksualitet. Hon kann eisini gera aðrar átrokandi samrøður og kanningar, sum skúlin metur eru neyðugar.*

-----------------------------------------------------------

Skúlastýrið heldur ikki hetta vera nøktandi og heitir á skúlastjóran um, saman við skúlastjóranum á Tvøroyari, venda sær til Gigni  og royna at fáa hetta í rættlag.

Ad. 6

Skúlastýrið ynskir sær eina meira aktiva heimasíðu. Møguliga eina nýggja heimasíðu.

Næsti fundur er 06.12.2022 kl. 17:00

D. Poulsen
Durita Poulsen

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Levi Mørk

Jónleyg d. Finnsdóttir
Jónleyg Eyðunsson

Elin Tausen
Elin Tausen